Prix Føroyar er ein tónleikakapping, sum Norðurlandahúsið í Føroyum skipar fyri í samstarvi við Føroya Undirhaldstónleikarafel ag (FUT), Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya. Kappingin hevur verið hildin annað hvørt ár síðani 1995.

Kappingin er skipað við fimm innleiðandi umførunum, har vinnarin í hvørjum umfari kemur í finaluna. Bólkarnir, sum enda sum nummar 2 til innleiðandi umførini, skulu kappast í eini hálvfinalu, har vinnarin fær seinasta finaluplássi.

Endmálið við kappingini er at hækka støðið innan føroyskan tónleik. Kappingin vendir sær til føroyskar undirhaldsbólkar, rockbólkar og onnur við tí í hyggju, at geva vinnarunum møguleikan at spæla á útlendskum palli.

Øll tey innleiðandi umførini verða hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Finalan verður í Norðurlandahúsinum í Havn.

29 bólkar eru við í kappingini í ár. 6 bólkar sleppa í finaluna.

**1. umfar, 25. januar kl. 21.00**
Flux
S.C.A.T.G.O.H
Headache Blues Treo
Søren Søgaard
MC Hár
Human Chaos
Vinnari: MC Hár
Nummar 2: Headache Blues Tro

**2. umfar, 1. februar kl. 21.00**
Mind's Eye
Déjá Vu
onkikanndiskuterast.alt kann
Speaker
Holgar og Villmenn
Vinnari: Déjá Vu
Nummar 2: Mind's Eye

**3. umfar, 15. februar kl. 21.00**
Braccet
Crashwave
Mary's Baby
Lawetz
Krit
Masha (fluttir frá 2. umfari)

**4. umfar, 22. februar kl 21.00**
Makrel
Chain
Side Effect
Fluffy Toys
MMM
Páll Finnur Páll

# Vágamenn uttan vágasound

**Bólkurin Masha er mannaður við fýra vágamonnum, men har er einki vágasound. Bólkurin spælir melodiøsan rocktónleik, og tørvur á sangara gjørdi, at teir noyddust at flyta umfar**

VÁGAMENN
*Eyðun Klakstein*



*Síðani tað var koyrandi um Vestmannasund, hevur Masha fingið sær trillibørur at flyta ljóðførini hjá sær við*

*Mynd: Edvard Joensen*

Upprunaliga skuldi bólkurin Masha spæla í 2. umfari í Prixnum, sum varð hildið fyri tveimum vikum síðani, men teir høvdu manglað sangara og høvdu funnið ein nýggjan í síðstu løtu.

Hetta gjørdi, at leiðslan fyri Prixið lat teir spæla í 3. umfari ístaðin.

Og nú er tað so álvari hjá teimum fýra vágamonnunum í bólkinum, og teir ætla sær ikki so lítið.

– Vit ætla at vinna Prixið. Nei, lat okkum fyri fyrst siga, at vit ætla at vinna innleiðandi umfarið leygarkvøldið, sigur Tummas Gudmudssen, sum spælir ljómborð í bólkinum.

– Tað gekk væl hjá okkum fyri tveimum árum síðani, men vit komu tíverri ikki í finaluna. Nú hava vit skift sangara, og vit ætla at royna einaferð afturat.

## Einki vágasound

Holgar & Villmenn spældi í seinasta umfari, og har var avgjørt nakað av vágasound at hoyra. Hetta verður ikki endurtikið, tá ið Masha fer at spæla fríggjakvøldið.

– Nei, her er einki vágasound, vit eru ikki somu megin vatnið, so tað verður eitt annað slag av tónleiki. Vit spæla rocktónleik, sumt er hart, men tað er eisini melodiøst, sigur Tummas Gudmundssen.

Síðani Masha royndi seg í innleiðandi umfarinum í Vágum í 2001, hevur ikki nógv verið at hoyrt til bólkin, men teir vóna, at teir fáa møguleikan at spæla meira komandi tíðina.

– Onkrar smáar uppgávur eru í Vágum, men tað er ikki nógv. Vit vilja fegnir spæla meira, og vit skulu vera við á eini konsert í Havn í næsta mánaði. Vónandi verða tað eisini aðrir møguleikar hjá okkum at spæla.

## Okkurt nýtt

Tónleikurin, sum Masha fer at spæla leygarkvøldið, er nýtt og gott gamalt.

– Vit hava gjørt onkran nýggjan sang til Prixið, men vit brúka eisini okkurt, sum vit hava havt liggjandi, sigur Tummas Gudmundssen.

Og við ella uttan vágasound, so ætlar bólkurin úr Sandavági at gera vart við seg í kappingini.

Fyrsta málið er eitt finalupláss.

# Eivør á stórskíggja

Leygarkvøldið verður Eivør Pálsdóttir ein serligur gestur til Prixið. Tað verður ikki í livandi líki á pallinum, men hivegin umvegis sjónvarpaðar myndir úr Íslandi.

Eivør skal syngja í íslendska Grand Prixnum leygarkvøldið, og framførslan hjá henni verður víst á stórskíggja í Mentanarhúsinum.

– Hetta gera vit, so tey, sum koma til Prixið, eisini kunnu síggja framførsluna hjá Eivør, sigur Fróði Vestergaard, samskipari.

Tá ið Eivør skal á pallin í Íslandi verður ein stuttur steðgur í Prix-tiltakinum í Fuglafirði.

**ek**




# Prixið og grindin



*Eyðun Klakstein*

Triðja undanumfarið í Prixnum verður í Fuglafirði leygarkvøldið, og talan er um eitt umfar, har tað ber illa til at peika á ein greiðan favoritt. Rockbólkurin Krit er helst kendasta navnið, men teir hava ikki skarað framúr tónleikaliga enn, og tí kunnu aðrir bólkar eisini blanda seg upp í kappingina.

Formaðurin í Føroya Undirhaldstónleikarafelag segði fyri 10 døgum síðani í Prix-sendingini hjá SvF, at føroyingar mugu koma burtur frá grindamentalitetinum, tá ið tað snýr seg um tónleik. Við hesum meinti Kaj Johannesen við, at tónleikarar knappliga leypa upp frá og finna upp á eitt ella annað, tá ið eitt hvørt serligt er á vási. Sum til dømis Prix Føroyar.

Tað vóru nógvir sannleikar í hesi útsøgn, og triðja umfar í Prixnum er eitt sindur umboðandi fyri hendan mentalitetin. Her eru fleiri nýggir bólkar við, og onkur bólkur hevur valla verið virkin síðani seinasta Prixið fyri tveimum árum síðani.

Grindamentaliteturin hevur fleiri ting við sær, og onkur kunnu vera góð. Bólkarnir eru ikki kendir frammanundan, og tað kann geva áhoyrarunum onkur óvæntað upplivilsi. Soleiðis var til dømis við Mind´s Eye í farna umfari. Har var talan um bólk við spennandi úttrykkið, hóast teir enn kunnu mennast tónleikaliga.

Tað førir eisini við sær, at tónleikarar leita saman í nýggjar samansetingar, og við hvørt kann okkurt gott spyrjast burturúr tí. Bólkurin Clickhaze var til dømis eitt úrslit av nýggjum samstarvi millum tónleikarar, sum høvdu spælt í ymsum samanhangum frammanundan.

Men grindamentaliteturin hevur eisini ymiskt við sær, sum er minni hugaligt at tosa um. Bólkarnir kunnu ikki vera væl samanspældir, tá ið tónleikararnir bert hava spælt saman í nakrar fáar mánaðir, og hetta hevur eisini merkt fleiri av bólkunum í kappingini higartil. Tónleikaliga dygdin hjá summum bólkum er ikki tann, sum krevst av einum bólki, sum veruliga ætlar sær nakað við tónleikinum. Tað skal miðvíst arbeiðið til fyri at fáa ein bólk at svinga, og tað krevst eisini, at tónleikararnir eru dugnaligir hvør í sínum lagi.

Ungir tónleikarar skulu ikki missa mótið, hóast teir ongan veg koma í Prixnum, tí síðani kappingin byrjaði fyri átta árum síðani, hava tað verið fleiri dømi um tónleikarar, sum hava tikið seg nógv fram, og hava gjørt meira vart við seg aftaná nøkur ár. Allir bólkar skulu byrja onkrastaðni, og Prixið er millum annað vorðið ein pallur hjá teimum, sum hava hug og áræði at føra seg fram við tónleiki.

Leygarkvøldið verður so triðja undanumfarið, og kappingin tykist verða púra opin frammanundan. Seks bólkar liggja framvið, og talan er um um fleiri ókendar bólkar. Krit hevur verið nógv frammi seinasta árið, og Masha hevur verið við í Prixnum áður. Men fýra aðrir bólkar ætla eisini at liggja fram við, og so fæst at síggja, um andaligi leiðarin í MC Hár kann fegnast um, at ein havnabólkur afturat verður í finaluni.



# Olivia stílar høgt

**Fyrsti kvinnuligi sangarin í Prixnum í ár fer á pallin í Fuglafirði leygarkvøldið. 17 ára gamla Olivia Mikkelsen hevur stórar ætlanir við tónleikinum, men hon ætlar sær at taka eitt stig í senn fram ímóti eini yrkisleið sum tónleikari**

KVINNUR
*Eyðun Klakstein*



*Nú koma kvinnurnar á Prix-pallin. Olivia Mikkelsen er sangari í bólkinum Mary´s Baby, har ein onnur kvinna, Sunneva Eysturstein spælir ljómborð*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Meðan genturnar fullkomiliga dominera kappingar sum Ársins Songrødd og Barnaprixið, er støðan ein heilt onnur, tá ið tað ræður um luttøkuna í Prix Føroyum.

Tá ið Flux var á pallinum í fyrsta umfari av Prixnum, komu tvær gentur á pallin at spýta eld, men tað er higartil einasta kvinnuliga umboðanin á pallinum. Tað var ikki so frætt, at MC Hár kundi vartra upp við øðrum enn longum mannfólkahári.

Leygarkvøldið kemur vend í, tí tá fer eysturoyarbólkurin Mary´s Baby at spæla. Har er ikki bara ein kvinna við í bólkinum, tær eru heilar tvær í tali, og onnur teirra er frontfigurur í bólkinum.

– Eg dugi ikki at siga, hví tað eru so fáar gentur við í Prixnum, men kanska tora tær ikki at halda seg framat. Tær tíma kanska betur at syngja einsamallar til Ársins Songrødd, sigur 17 ára gamla Olivia Mikkelsen, sum er sangari í Mary´s Baby.

## Kór og songrødd

Olivia hevur sungið í kóri, síðani hon var 14 ára gomul, og hon hevur eisini roynt seg í onkrum tónleikabólki áður.

Í fjør var hon við í kappingini um at gerast Ársins Songrødd, og hon stóð seg sera væl. Hon slapp við í finaluna, og har var hon bert eitt fet frá at vinna kappingina. Hon gjørdist nummar tvey.

Hetta hevur helst verið viðvirkandi til, at manningin í bólkinum Mary´s Baby sendi boð eftir ungu gøtugentuni.

– Eg var til eina konsert í Losjuni í Gøtu, tá ið teir komu og spurdu meg, um eg hevði hug at syngja í teirra bólki. Eg tók bara kjansin, og mær dámar betur at syngja í einum slíkum bólki, enn at syngja í kóri, sigur Olivia.

Hon fór upp í Mary´s Baby í september mánaði, og síðani hava tey javnan vant. Seinastu vikurnar hevur venjingini eisini verið nógv, men Olivia heldur, at tey hava eitt avslappað forhold til kappingina.

– Vit gera ikki ov nógv av, og vit royna at hava tað gott, tá ið vit venja og spæla, sigur hon.

## Eivør spøkir

Helst fremsta føroyska songkvinnan í løtuni, Eivør Pálsdóttir, er úr Gøtu, og tí er tað trupult hjá eini ungari gentu úr Norðagøtu, at sleppa undan eini samanbering við songfuglin, sum vann Prixið fyri tveimum árum síðani.

– Eg og Eivør hava báðar sungið í kórinum Gøta/Leirvík, og vit hava havt sama kórleiðari, sum hevur lært okkum ymiskt. Men, sigur Olivia Mikkelsen og fyrireikar seg næstan til at leggja sjógv ímillum seg og Eivør.

– Eivør er sjálvandi ein fyrimynd, men um fólk fara at siga, at vit líkjast á onkran hátt, so er tað kanska tí, at vit hava sungið í sama kóri og hava havt sama kórleiðari. Eg leggi meg í øllum førum ikki eftir at líkjast Eivør, eg royni at finna mín egna stíl, sigur Olivia.

## Útlandið

Hon ætlar sær ikki at lata seg nerva av, at Útvarpið sendir beinleiðis, og at nógv upptøkutól fylgja framførsluni í Prixnum.

– Eg havi sungið live í Útvarpinum fyrr, og eg fari bara at lata sum um, at upptøkutólini ikki eru har. Eg rokni ikki við, at tað verður tað, sum eg fari at hugsa um, tá eg eri á pallinum, sigur Olivia Mikkelsen.

Hon hevur ætlanir um at fara á sangskúla í útlandinum, og hon vónar eisini, at hon kann fáa eina yrkisleið sum tónleikari. Men hon fer ikki at leypa fram av.

– Eg taki eitt stig í senn, sigur hon og vil ikki so frætt sum siga, um hon ætlar sær við í Ársins Songrødd aftur.

# Tveir I AM tónleikarar kappast

Fyri tveimum árum síðani var bólkurin I AM í finaluni í Prix Føroyum. Hesaferð fara tveir av tónleikarunum at royna seg aftur, men tað verður í øðrum bólkum.

Gittarspælarin Arni Zachariassen spælir í bólkinum Braccet, og trummuspælarin Hans Ove Johansen er við í bólkinum Crashwave.

Umstøðurnar hava lagað tað soleiðis, at teir báðir tónleikararnir koma at kappast ímóti hvørjum øðrum leygarkvøldið.

– Eg veit, at Arni er ein góður gittarspælari, men eg kenni ikki nýggja bólkin, sum hann er við í, sigur Hans Ove Johansen.

I AM er ikki givið at spæla, men teir hava ikki verið serliga virknir, síðani sangarin, Birgir I. Sigurðsson, fór undir lestur niðri í summar. Teir hava tó onkrar planir fyri hetta árið.

**ek**

**5. umfar, 8. mars kl. 21.00**
Týr
Zink
Blív
Jam
Gestir
Hatespeech

**Hálvfinala, 15. mars kl. 21.00**
Allir bólkarnir, sum endaðu sum nummar 2 í teimum fimm innleiðandi umførunum, kappast um eitt pláss í finaluni

**Finala, 26. apríl**
Tann stóra finalan í Norðurlandahúsinum. Seks finalistar kappast um sigurin í kappingini og møguleikan at spæla á donskum festivalum.

**Dómarar**
10 dómarar meta um framførslurnar hjá bólkunum til tey innleiðandi umførini. Teir geva bólkunum stig fyri teir ymsu partarnar av framførsluni. Stigini hjá øllum dómarunum verða tald saman, og síðani verður vinnarin funnin. Í finaluni eru 28 dómarar.

**Vinnarar**
1995: Moira
1997: Mark No Limits
1999: Taxi
2001: Clickhaze

**Atgongumerki**
Atgongumerki til innleiðandi umførini kunnu keypast á Kunningarstovunum kring landið, í Mylnuni í Miðvági og á Shellstøðini í Gøtudali. Eisini ber til at keypa atgongumerki á www.billetmaskinen.dk
600 fólk sleppa inn til hvørt umfar.

**Bussar**
Í sambandi við kappingina leygarkvøldið koyra bussar til og frá tiltakinum.
Bussar fara úr Vestmanna, Sørvági og úr Havn kl. 20.00
Bussar fara av Toftum og Strondum kl. 20.30. Teir steðga ávíkavist í Leirvík og í Gøtu kl. 20.50.
Aftan á tiltakið koyra bussarnar heim aftur.

**Ferja**
Sjóvegis samband verður til Klaksvíkar kl. 03.45 av Fuglafirði. Ferðaseðlar skulu keypast í Norðoya Kunningarstovu og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

**Prix í Sosialinum**
Lagt til rættis:
Eyðun Klakstein
Teldupostur:
eydun@sosialurin.fo